UTTAN ÚR HEIMI

# Nógv olja kann vera eftir í Norðsjónum

**Sambært einari nýggjari kanning hava norðmenn bara funnið eitt prosent av oljuni í tí týdningarmesta partinum av Norðsjónum enn.**

OLJA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hevur Holger Justwan á jarðfrøðideildini á lærda háskúlanum í Bergen rætt, kunnu norðmenn hava ovmikið eftir av bæði olju og gassi í Norðsjónum.

Seinastu trý árini hevur hann kannað ta jarðfrøðiligu gongdina í hesum økinum tey seinastu 60 milliónir árini, og niðurstøða hansara er, at enn hava norðmenn bara funnið eitt prosent av teirri olju, sum eina ferð varð til undir havbotninum frá Frigg-økinum í norði til Sleipner-økið í suðri. Har kann eisini vera nógv gass eftir, tí sambært útrokningunum hava oljufeløgini bara funnið 10 prosent av gassinum, sum varð til har.

Tann stóri spurningurin er, um oljan og gassið eru har enn. Í samrøðu við Aftenposten sigur Holger Justwan, at ein stórur partur av oljuni og gassinum kan vera horvin seinni. Tað er heldur ikki vist, at tað ber til at finna alt, sum er eftir, sigur hann. Hinvegin ivast hann ikki í, at tað ber til at finna fleiri keldur afturat.



**Borin út** *Jødisku niðursetufólkini á Vestara Áarbakka seta seg javnan upp ímóti ísraelska herinum. Í gjár máttu hermenninir bera hesa kvinnuna burtur, tá hon sýtti fyri at fara úr einum húsum í Hebron, sum palestinar eiga.*

# Hon var við "Titanic"

**Lillian Gertrud Asplund sá pápan og brøðurnar standa eftir við lúnningina, tá "Titanic" sakk.**

ANDLÁT
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Lillian Gertrud Asplund var millum ferðafólkini við "Titanic", tá skipið fórst á sínum fyrsta túri um Atlantshavið tann 12. apríl í 1912. Hon, pápin og fýra brøður hennara høvdu verið í Svøríki, haðani pápin og mamman vóru ættað, og vóru á veg aftur til USA, har tey búðu. Sjálv var hon fimm ára gomul.

Seinni greiddi Lillian frá, at hon varð sett í ein bjargingarbát ígjøgnum eitt vindeyga, og at hon gloymdi ongantíð andlitsbragdið á pápanum og brøðrunum, sum stóðu eftir við lúnningina, tá skipið sakk.

Um vikuskiftið doyði Lillian Gertrud Asplund sum tann seinasti amerikanarin, sum var við "Titanic". Hon var 99 ára gomul.

Tvær aðrar kvinnur, sum vóru við skipinum, eru framvegis á lívi, men tær vóru so lítlar tá, at tær minnast einki frá vanlukkuni. Hildið verður, at báðar búgva í Bretlandi.



STUTT SAGT

## Hann skal drepast

Flogseðlar, sum pakistanskir ættarleiðarar hava fingið teir seinastu dagarnar, mæla leiðarunum til at beina fyri pakistanska forsetanum, Pervez Musharaf, skrivar AP. Flogseðlarnir eru frá yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda, og á teimum verður Musharaf umrøddur sum trælur hjá amerikanska forsetanum, George W. Bush. Eitt nú verður Osama bin Laden endurgivin fyri at siga:

–Eg biði Guð geva Bush, Pervez og heri teirra ta lagnu, teir hava uppiborið, og at onkur av Guðs leyvum fær høvi til at drepa pakistanska trælin hjá Bush.

Tað er ikki greitt, um áheitanin veruliga er frá bin Laden, men eygleiðarar í Pakistan siga innihaldið á flogseðlunum ver eina greiða ábending um, at stríðið ímillum pakistanska herin og uppreistrarmenninar á markinum ímillum Pakistan og Afghanistan er vorðið harðari í seinastuni.

## Fleiri ódnir og skjálvtar

Stjørnufrøðingar á einum stovni í Burma siga seg síggja tekin í stjørnunum, sum boða frá, at vit kunnu vænta fleiri jarðskjálvtar og ódnir.

Than Htay, varaleiðari á stovninum, sigur við tíðindastovurnar, at hann og hansara felagar eru so sannførdir um tað, sum teir síggja, at teir ætla sær at gera eina ávaringarskipan, sum skal varskógva fólk, tá jarðskjálvti ella ódn er á veg.

Í løtuni arbeiða teir burmesisku stjørnu–frøðingarnir við at samanbera kanningar–úrslitini við hagtøl hjá altjóða veðurfrøðini. Vísir tað seg, at upplýsingarnar samsvara við hvør aðra, kunnu vit vænta tær fyrstu ávaringarnar ímóti jarðskjálvtum og ódnum næsta ár.

## Húsmóðurin nógv verd

Ein kanning í USA vísir, at hevði ein húsmóður fingið løn fyri alla ta tíð, hon arbeiðir, hevði hon fingið meiri løn enn flestu stjórar. Í USA hevði hennara ársløn ligið um knappar 800.000 krónur.

Amerikanska kanningin vísir, at ein húsmóður arbeiðir vanliga 44 tímar á sínum arbeiðsplássi og 49,8 tímar heima við hús um vikuna. Húsmøður, sum ikki er á arbeiðsmarknaðinum, arbeiða í meðal 91,6 tímar heima við hús um vikuna.

Bill Coleman, sum hevur verið við til at gera kanningina, sigur við AP, at 5,6 milliónir amerikanskar kvinnur eru ikki á arbeiðsmarknaðinum, men arbeiða heima við hús. Hann heldur, at samfelagið eigur at viðurkenna týdningin av arbeiði teirra, tí tað er nógv meiri vert, enn tey flestu geva sær far um, sigur hann.

## Druknaðu í betong

Tríggir amerikanskir arbeiðsmenn doyðu leygardagin, tá teir duttu niður á eitt nýstoypt gólv í einum háhúsum í Miami.

Gólvið var stoypt við betongi, sum tornar serliga skjótt, og hóast starvsfelagar teirra royndu at fáa teir leysar, eydnaðist tað ikki. Ein av monnunum fór undir beinanvegin, meðan hinir báðir royndu at sleppa uppaftur, men til fánýtis, skrivar blaðið Miami Herald. Ein talsmaður hjá bjargingartænastuni sigur við blaðið, at teir tríggir vórðu jarðaðir livandi.

Tað eydnaðist seinni at fáa líkini leys, men tað tók drúgva tíð, tí nógv jarn var í betonggólvinum.

Teir tríggir vóru saman við øðrum í ferð við at stoypa tað seinasta gólvið í einum háhúsum í 27 hæddum, tá vanlukkan hendi. Tað er ikki greitt, hví tað, sum teir gingu á, fór undan teimum.